

Terje B. Vestergaard
*Formaður í Neptun (Turrasta svimjifelag í Føroyum)*

# »Nú er løtan«

*Ein áheitan til Runavíkar kommunu*

»Nú er løtan« er eitt av teimum vælsvingandi løgunum, sum hava rungað um oyggjarnar seinastu tíðina, og haldið eg eisini at tað er ein hóskandi yvirskrift, til hesa áheitan til Runavíkar kommunu, um at nýta lagaligu løtuna, at byggja tann leingi væntaða svimjihylin í Runavík.

### Svimjifelagið Neptun

Í 1964, tóku nakrir ungir menn við áræði, stig til at stovna svimjifelagið Neptun, sum skuldi hava til endamáls, at fáa ein svimjihyl bygdan á Glyvrum. Teir gjørdu alt, sum stóð í teirra magt til tess, og fingu bæði tekningar, grundstykki og fígging til vega. Tað skuldi tó vísa seg, at hetta ikki var so lætt, sum tað sá út til, og tá kommunan, av áðum, sum eg ikki komi inn á her, trekti sín part av fíggingini aftur, datt alt niður fyri. Hetta hevði við sær, at hóast so gott sum allar grannakommunurnar hava svimjihyl, er ongin svimjihylur enn bygdur í Runavíkar kommunu, hóast hetta hevur verið eitt av fólksins hægstu ynskjum øll hesi árini.

Lat meg nú ikki gerða kommununi órætt, ein hylur bleiv bygdur í Søldarfirði, men hann velji eg, av góðum grundum at síggja burtur frá.

### Skúlabygging uttan svimjihyl

Í 2005 fór Runavíkar kommuna undir nýggja skúlabygging við løkin í Runavík, og sóu somu menn, sum stovnaðu felagið í sínari tíð, nú ein møguleika til at fáa ein svimjihyl bygdan, saman við nýggja skúlaprojektinum. Tí tóku teir stig til at endurstovnað gamla felagið, sum ikki hevði verið virkið síðani, og heittu tí á yngri kreftir um at taka yvir. Undirritaði bleiv, sum sjálvur fimti, valdur í nevndina, sum skuldi royna at koma í samskifti við kommununa, um at fáa svimjihyl bygdan saman við skúlanum.

Tað var við stórum spenningi, at vit sum nevnd fóru til verka, og sóu vit fyri okkum, at nú fór at bera til, tí teir sum tá ráddu fyri borgum, vórðu flest allir valdir inn í kommununa, uppá gylt vallyftir um ein svimjihyl, og væntaðu vit tí, at hetta var eitt upplagt høvi hjá teimum, at halda givin lyftir. Hetta skuldi tíverri ikki vísa seg at verða so, vit fóru sum flongdir hundir av fundinum, boðini vórðu, at tað bar als ikki til hjá kommununi at spenna seg fyri meir enn tá var budgettera við. Vit høvdu entá verið so raskir, at hava eitt alternativt projekt við okkum, sum vit høvdu fingið til vega frá einari donskum svimjifelag, sum passaði væl til okkara tørv, og sum hevði ein kostnað, sum leysliga mett, var uml. helvtina lægri enn projektið sum kommunan hevði liggjandi. Tað løgna og undrunarsama, sum hendi bert 2 mánaðar seinni var, at nú bar til at spenna budgettið hjá kommununi við meir enn tí kostnaði, sum tilsvaraði tí alternativa projektinum, sum vit høvdu víst á, tí nú skuldi mentanarhús/aula og matstova byggjast saman við skúlanum. Í dag er meirkostnaðurin í mun til fyrsta budgettið helst væl dýrari enn projektið hjá kommununi var. Hetta er tó farið, og hava vit helst fínasta og best útgjørda skúla í landinum, har bæði Løkshøll og matstovan eru ein sonn perla, sum vit øll kunnu gleðast um og verða stolt av, og sum helst eru hvørt oyra vert.

### Nú er løtan!

Nú situr nýggj manning í kommununi, og er tað ongin loyna, at teirra uppgáva ikki hevur verið heilt løtt, tí kommunan hevur verið fíggjarliga niðurbundin, vegna fígging av skúla og barnagarðs bygging. Hetta fer tó at verða avgreitt skjótt, og fari eg tí at heita á kommununa, um at leggja út í kortið av nýggjum, har svimjihylurin, sum flest øll í okkara parti av kommununi vilja hava, verður settur, sum fremsta raðfesting.

### 50 metra hylur í Runavík

Júst í hesum døgum, verður nógv prátað um mangulin av einum 50 metra hyli, og hevur tað ljóðað av hægsta stað, at fígging skal fáast til vega til ein 50 metra hyl. Hetta má so avgjørt verða tað gylta høvið hjá okkum, at bjóða okkara øki fram til bygging av hesum hyli. Um stutta tíð, verða vit knýtt tættari til høvuðstaðarøkið, og er tað sjálvsagt at vit, sum saman við grannunum á Toftum eru ein verðuligur ítróttarmiðdepil, bjóða øki fram til hesa skilagóðu verkætlan.

Eg vil fegin undirstrikað, at hetta lesarabræv, er ikki skrivað sum ein klaga um nakað ella nakran, men bert sum ein lýsing av støðuni og sum ein áheitan til fólk og mynduleikar á staðnum.

Eg vil at enda heita á Runavíkar kommunu og fólkið á staðnum um at standa saman um hesa verkætlan, og fremja hana í verkið. Verkætlanin hevur staðið á pappírinum alt ov leingi, Nú er løtan, vit prógva á so mongum økjum, at vit kunnu ganga undan, bæði tá tað kemur til vinnulív, mentan og ítrótt, og trúgvi eg, at tað eisini fer at bera til at fremja hesa verkætlan í verkið.

***Við Svimjihylskvøðu***

Facebook: "Svimjifelagið Neptun" ella "Svimjihyl í Runavík innan 2015"



Richard Danielsen

# Fimm dømi um hvussu dómur Guds hevur rakt samfeløg

**1. partur**

Vit lesa mangar staðir í bíbliuni um dóm. Ja, bíblian er ein bók um dóm og frelsu. At enda kemur tann endaligi dómurin yvir heimin, og hann vil forganga.

Eg fari her at taka fimm dømi fram úr Gamla Testamenti, sum líkjast, og felags fyri tey, er at tíðin í dag líkist teimum serliga nógv.

Nóaflóð.
*Táið nú menniskjan fór at nørast á jørðini, og døtur føddust teimum, sóu gudssynirnir, at menniskjadøturnar vóru vakrar, og teir tóku sær konur, so mangar sum teimum lysti. Tá segði HARRIN: "Andi Mín skal ikki til ævigar tíðir stríðast við menniskjuni! Í villing síni eru tey hold; dagar teirra skulu vera 120 ár." Á teimum døgum, og eisini seinni í tíðini, vóru kapparnir á jørðini - táið gudssynirnir fóru inn til menniskjadøturnar, og tær føddu teimum børn; hetta vóru teir veldigu í forðum, teir navngitnu. Men HARRIN sá, at óndskapurin í menniskjunum var stórur á jørðini, og at hjartans hugsan og tráan teirra var ikki annað enn ilt allan dagin. Tá angraði HARRIN, at Hann hevði gjørt menniskjuna á jørðini; tað voldi Honum sorg í hjartanum. Og HARRIN segði: "Eg skal týna menniskjuni, ið Eg havi skapt, av jørðini, bæði menniskju, fæ, skriðdýr og fuglarnar undir himli; tí Eg angri, at Eg havi gjørt tey!"* 1. Mós. 6,1-7.

Harrin dømdi hin forna heimin á døgum Nóa vegna tað gudloysi, sum fór fram, og vit síggja her, at tað sexuella var farið heilt av lagi. Ætlan Guds frá byrjanini, við at maðurin fer frá faðir og móður síni og heldur seg til konu sína, ikki konur sínar, var blivið til fleiri konur, við tað at girndir mansins høvdu tikið valdið. Ætlan Guds at byggja upp heim, sum aftur gjørdist til skipað samfeløg var vrakað, og tilvildin hevði tikið maktina og valdaði.

Tá ið Gud oyðir samfeløg fyri syndir teirra, vísir tað seg, sum at tað sexuella altíð er farið heilt av lagi, í hvussu so er tað soleiðis í hesum fimm førunum.

**Framhald**



Jenis av Rana
*Formaður Miðfloksins*

# Skulu pensionistarnir gjalda fyri keypið av Atlantsflog?

Samstundis sum kvinnuliga landsstýrisumboð Sambandsflokins sendur rokning eftir rokning til tey veiku á niðastu samfelagsrókunum, boðar vinnumálaráðharrin úr sama flokki frá ætlanum um møguliga at keypa Atlantsflog.

Týsdagin í farnu viku viðgjørdu vit á Løgtingi uppskot frá landsstýriskvinnuni í almannamálum um tey, ið brúka hoyritól. Kravið var kr. 2000 í egingjaldi fyri hvørt tólið. Hetta førdi sjálvsagt til spurningar, um talan var um byrjandi egingjald á heilsutænastum og spurningar um, hví eitt møguligt egingjald ikki varð inntøkujavnað, soleiðis at tey á ovastu rókum guldu, og tey við lítlum og ongum fíggjarmøguleikum vórðu spard.

Undir viðgerðini upplýsti formaðurin í trivnaðarnevndini, at hetta mátti gerast, tí at »fíggjarliga brýtur í bæði borð í landskassanum«.

### Eru ikki øll landsstýrisfólk kunnaði um brotini?

Feskasta dømið um, at ikki øll landsstýrisfólk vita um hesar brotasjógvar, frættu vit longu hósdagin, tvs. tveir dagar eftir 1. viðgerðina av lógaruppskotinum um hoyritól. Tá boðaði landsstýrismaðurin í vinnumálum brádliga í fjølmiðlunum frá, at nú er tíðin komin, at landið antin selur ella kepir Atlantsflog. Og hann boðaði frá, at hann í næstum fer at senda uppskot um hetta í Løgtingið.

### Keypa Atlantsflog- fyri hvat?

Ístaðin fyri at leggja árar í sjógv og finna nýggjar inntøkur hava vit ferð eftir ferð sæð, at landsstyrið bert veit um ein veg, tá peningur skal finnast- inn á almanna og heilsuøkið við eykakrøvum.

Tað kann ikki verða so galið, at landsstýrið fer at senda enn eina rokning til hesar somu borgarar, hesaferð fyri eitt flogfelag?

Føroya fólki tørvar eina greiða frágreiðing um, hvussu keypið skal fíggjast.